# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

**Bilradio á Rás2** *hósdagin kl. 16.05*

*Í sendingini er samrøða við Hugo Skorastein, ið var ein av føroyingunum, sum vitjaðu størsta truckerfestivalin í Skandinavia. Eisini eru samrøður við limir í Dansk Veteranbil Klub, sum vitja í Føroyum við sínum ellisakførum.*




*Føroyingar á Nordic Trophy f.v.: Ovi Magnussen, Fróði Poulsen, Øssur Hentze og Eyðun Magnussen. Bilurin er ein Scania R 999 er, sum er ein umbygdur Scania T 500 við túsund hestakreftum*

# Størsti truckerfestivalur í Skandinavia



**Fjúrtan føroyingar vóru við til størsta truckerfestivalin í Skandinavia, har nógvir av flottastu lastbilunum í Evropa vórðu sýndir fram**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Øssur Hentze*

At flott lakkeraðir og vælútgjørdir lastbilar er nakað sum hevur stóran áhuga millum fólk - kanska serliga mannfólk, hevur føroyski Truckerfestivalurin seinastu árini víst.

Kring um í heiminum eru nógv tílík tiltøk. Eitt av teimum stóru tiltøkunum í Evropa, og tann størsti truckerfestivalurin í Skandinavia, er Trailer Trucking Festival & Nordic Trophy í Svøríki, sum hesaferð var í Linkjøping í døgunum 28.-29. august 2009.

Eitt ferðalið við 14 føroyingum var við til festivalin, har umleið 300 framsýnarar sýndu fram sínar flottu bilar og aðra útgerð til lastbilar. Umframt bilar og útgerð varð eisini skipað fyri ymiskum kappingum.

Í samrøðu í Bilradio á Rás2 sigur Hugo Skorastein úr Leirvík, sum er ein av fyriskiparunum av føroyska Truckerfestivalinum, frá um túrin, og alt sum var at síggja á festivalinum í Svøríki.



*Motivsproyting er ein partur av truckerframsýningum*



*Carsten Nielsen við Scania bilinum sum eisini varð sýndur fram á Truckerfestivalinum í Klaksvík fyrr í ár*